## Claus og teir taptu aftur

Blackpool tykist mest sum uppstegðað í triðbestu ensku fótbóltsdeildini. Triðju ferðina á rað mátti Blackpool lúta í landskappingardysti. Leygardagin vitjaði Millwall í norðurenska býnum, og gestirnir fóru avstað við øllum trimum stigum. Einasta málið í dystinum gjørdi London-liðið í fyrra hálvleiki. Blackpool er nú dottið niður á 10. pláss í League One, har 24 lið spæla við.



## EB/Streymur brendi tvey brotsspørk

EB/Streymur gjørdi sær stóran ómak við einki mál at gera, tá ið liðið spældi venjingardyst ímóti HB leygardagin. Dysturin, sum varð spældur í Streymnesi endaði málleysur, men tað hevði heimaliðið sjálvt skyldina av. Heilar tvær ferðir fekk EB/Streymur brotsspark, men hvørgu ferðina eydnaðist teimum at skora úr ellivu metrum.

Neistin-Kyndil 25-33 (13-14):

# Meistarar á meistarakós

**Enn er Kyndil ikki í FM-finaluni. Men við spælinum, sum liðið hevur sýnt seinastu dystirnar, skal eingin verða bilsin, um FM-steypið verður verandi hjá grøna havnarliðnum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Verjan hjá Kyndli hekk fyri tað nógva heilt væl saman, og tí komu skjúttarnir hjá Neistanum sjáldan veruliga framat*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá alt kom til alt, so vant Kyndil burtur úr Neistanum sunnudagin. Ein sigur, sum munaði væl hjá teimum grønu í strembanini eftir øðrum finaluplássinum, samstundis sum Neistin við tapinum er mest sum úti úr tí stríðnum.

### Janus Einar í serflokki

Eitt er, at Kyndil vann grannauppgerðina. Tað høvdu tey flestu kanska rokna við, tí hóast Neistin hevur rættað sína kós seinastu dystirnar, so tykist liðið enn ikki veruliga gearað til at stríðast um gull og heiður.

Men tað var meira mátin, sum Kyndil vann uppá. Og kanska eisini hornasteinarnir í sigrinum, sum sannførdu um, at meistararnir veruliga eru á meistarakós. Enntá í einum dysti, har altíð væl stríðandi Hans Áki Dal Christiansen ikki var tøkur.

Tá teir grønu í fjør vunnu meistaraheitið við tryggum finalusigri á VÍF, var ein framúr verja ein týðandi partur av uppskriftini. Og longu fyrstu lítlu løtuna í dystinum móti Neistanum sást, at hendan nú aftur er um at fungera optimalt. Ikki minst, tí liðið í Janusi Einar Sørensen hevur ein strikuspælara, sum er so nógv tann besti í landinum – bara spælarin sjálvur vil tað.

Hetta gjørdi tað mest sum ógjørligt hjá skjúttunum hjá Neistanum at sleppa framat, og tá teir so kortini royndu seg, víst Lars Black, at hann avgjørt skal roknast millum teir allar bestu málverjarnar í landinum. Og at Kyndilsvenjarin hevur ein positivan trupulleikaámálverjasíðuna var sjónligt, tá Magnus Matras eina løtu avloysti Lars.

Týdningurin av Janusi Einar varð eisini undirstrikaður, tá hesin eina løtu noyddist á beinkin við einum minni snuddi. Framúr byrjanin hjá Kyndli, sum tá var á 9-4, varð brádliga tveitt burtur. Neistin vann seg enntá upp á 13-11, men tá Janus Einar aftur kom á vøllin, varð verjan læst, og so kundu teir grønu aftur vinna seg framum. Eisini tí hann í álopspartinum gav teimum eitt stórt trumfkort eyka, tá hann støðugt bant hálvan-annan Neistamann.

### Høgni móti tindunum

Ein stórur trupulleiki hjá Kyndli fyrsta partin av landskappingini í ár var, at spælskiparin og álopstrumfurin, Høgni Klein, var burturstaddur. Og tó at hann var við einstakar dystir, so var sjónligt, at venjingarstøðan ikki var tann besta, tá hann í desember aftur flutti til Føroya.

Síðani hevur hann tó spakuliga spælt seg í rætta dystarvenjing, og tað er nakað, sum nú av álvara hevur lyft Kyndil. Og hóast Neistin eina løtu í seinna hálvleiki hekk væl við í dystinum, so var so sera sjónligt, at álopsspælið hjá Kyndli hekk betri saman og var betri skipað. Teir komu nógv meira ómaksleyst til sínar skoringar, og tá Neistin so varð rakt av dupult-útvísing miðskeiðis í seinna hálvleiki, tóku teir grønu av.

Teir lupu nøkur mál avstað, og so gjørdist alt brádliga so fjáltursstungið hjá Neistanum, sum nú sá møguleikan fyri einum finaluplássið hvørva. Hópur av óprovokeraðum mistøkum vórðu revsað uttan stórvegis samkenslu av teimum grønu. Og so hjálpti tað lítið, at bæði Jacob Larsen og Ári Dam hvør í sínum lagi høvdu nakrar fínar bjargingar. Bjarga dystinum kundu teir ikki, og so vann Kyndil seinasta korterið av dystinum við ikki minni enn 13-5!

### Arbeiðið ikki hálvgjørt

Sigurin væl og virðiliga undirstrikaði, at Kyndil av álvara hevur kós móti finaluni. Men bæði spælarar og venjari vita væl og virðiliga, at enn er arbeiðið minni enn hálvgjørt. Tríggir dystir eru enn eftir, og í hesum kunnu bæði KÍF og StÍF arga. Kyndil hevur tó tann fyrimun, at teir eiga heimavøll móti júst hesum báðum, áðrenn teir í seinasta umfarinum fara til Vestmanna til ein dyst, sum alt meira líkist upphiting til sjálva FM-finaluna.

Neistin eisini enn ein møguleika at røkka finaluni, men í praksis er lítið at ivast í, at teirra leiklutur nú er útspældur. Úrslitini skulu laga seg meira enn óvanlgia væl, um teir skulu verða partur av avgerandi dystunum.

## FAKTA

**Neistin-Kyndil 25-33 (13-14)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Áki Mørk 8(2), Blagoje Buha 6, Roar Dalsgarð 5, Jugoslav Djumic 3, Tróndur Kragesteen 2, Dann Thorleifsson 11
**Kyndil:** Høgni Klein 11(3), Rókur Akralíð 6, Janus Einar Sørensen 4, Hjalti M. Jacobsen 4, Hanus Johansen 3, Ken Zachariassen 3, Ragnar Stakksund 1, Brian V. Poulsen 1
**Brotskøst:** Neistin 4, Kyndil 3
**Útvísingar:** Neistin 5, Kyndil 2
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen.